# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo


*Skrásetingar nr.:*

**L-B007-2**

# Leiðbeining um nýtslu av stigum

## *Góðkendir stigar.*

Stigar skulu verða forsvarliga tilgjørdir og eiga at verða royndir, góðkendir og merktir sambært DS/INSTA 650. Størst loyvdu longdir eru:

| *Størst loyvda longd av stigum* | |
|---|---|
| Trappustigar B | 1,6 m |
| Trappustigar A | 2,6 m |
| Kombistigar sum Wienerstigar | 4,0 m |
| Einkult- og wienerstigar | 6,0 m |
| Skjótistigar | 12,0 m |

- Stigar mugu ikki surrast, boltast ella neglast saman. Metalstigar mugu ikki nýtast, har vandi er fyri stoyti av ravmagnsleidningum.
- Træstigar skulu bert málast á útsíðuni á vangunum. Vangarnir innan og stigini kunna lakerast ella ferniserast.
- Stigar skulu kannast regluliga, um teir eru stúttir, og um teir hava fingið stoyt ella rivur.
- Stigar, sum ikki eru í lagi skulu umvælast av sakkønum persóni beinavegin ella burturbeinast.

## *Nýtsla av stigum.*

- Stigar mugu bert nýtast til arbeiði í stytri tíðarbili, tá tað er torført ella óhóskandi at skipa aðra atgongd til arbeiðið.
- Tá arbeitt verður skiftivís í stiga og á fastari grund (vølli, gólvi, trappu og tílíkt), má tíðar-skeiðið, sum tilsamans verður arbeitt í stiga, ikki verða meira enn ein triðingur av dagligu arbeiðstíðini.
- Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at leiðbeining verður givin í rættari nýtslu av stigum, og at tað eru stigar av røttum slag og longdum til tað arbeiðið, sum skal útinnast.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-F160-1 um reglur fyri byggipláss og líknandi arbeiðspláss frá 4. september 1995.


***Útgivið fyrstu ferð:*** **28. september 1988**

***Seinastu broytingar:*** **12. oktober 1995**

- Fleiri persónar mugu ikki arbeiða í sama stiga, tó kann ein persónur verða í hvørjari síðu í wienerstiga.
- Bert amboð, sum eru løtt at handafara við einari hond, skulu nýtast til arbeiði í stiga.
- Tilfar og amboð skal verða lætt atkomiligt, meðan arbeitt verður.
- Hóskandi fótbúni skal nýtast.
- Aluminiumsstigar mugu ikki standa undir vatni í longri tíð, tá hetta oyðileggur teir.

## *Uppseting.*

- Stigar mugu bert setast upp á vatnrøttum og føstum undirlagi, ið er soleiðis skikkað, at trygd er fyri, at stigarnir ikki glíður.
- Hallið á stiganum skal verða uml. 70 º.
- Stigar mugu ikki setast upp frammanfyri hurðum, uttan so at hurðarnar eru trygdarliga læstar.




- Verða stigar nýttir, ið eru meira enn 5 m langir, skal fótmaður verða, uttan so at stigarnir eru festir í erva.
- Stigar, sum verða nýttir sum farleið (eisini í byggipallum), skulu verða trygdarliga festir og røkka minst 1,0 m upp um staðið í erva, har farleiðin endar.

## *Winerstigar.*

- Wienerstigar skulu vera tryggjaðir móti at vangarnir glíða frá hvørjum øðrum. Haldgóðar ketur skulu festast í vangarnar báðumegin, umleið 1/3 frá fótinum á stiganum. Sama er galdandi fyri kombineraðar stigar.



- Topstykkini á wienerstiga skulu ikki verða soleiðis háttað, at tey spenna móti hvørjum øðrum, av tí at vangarnir av hesum kunnu klovna. Sleppast kann undan hesum trupulleika við at saga av annað "hornið".
- Winerstigar mugu bert nýtast sum einkultstigar, um teir eru innrættaðir til tess.
- Eykabein at leingja um stigan, tá arbeitt verður í trappu, eigur bert at nýtast til smærri wiener-stigar, upp til seks trappustig. Eykabeinini skulu vera haldgóð og væl fest.
- Kombineraðir stigar skulu hava breiðan stuðlafót, tá teir verða nýttir sum winerstigar.

## *Goymsla.*

Stigar skulu goymast á hóskandi staði, soleiðis at teir eru:
- lætt atkomandi,
- vardir móti veðurlagnum,
- kunna tornað, um teir hava verið vátir,
- væl stuðlaðir (langir stigar krevja fleiri stuðulspunktir).

## *Viðlíkahald av træstigum.*

- Stigar, ið eru á goymslu, eiga javnan at leggjast um, fyri at mótvirka skeivleikar.
- Flísar o.líkn. skulu beinast burtur við sandpappíri. Kann hetta ikki lata seg gera, skulu stigarnir sendast á góðkent verkstað.
- Umvælingarnar mugu bert gerast av sakkønum fólki.
- Træverjan skal haldast viðlíka.

## *Viðlíkahald av metallstigum.*

- Alminiumsstigar og stálstigar mugu ikki umvælast - teir skulu beinast burtur.

## *Leytarar.*

- Leytarar skulu verða forsvarliga tilgjørdir og festir.
- Teir skulu javnan kannast .
- Frá 2,5 m□s hædd skulu teir verða úygjørdir við ryggverju.
- Deildar ryggverjur skulu verða tryggjaðar móti at krøkja seg leysar.
- Fylgjandi leytarapartar eiga hægst at verða 6 m langir og útgjørdir við føstum botnum.




Myndin vísir, hvussu fastir leytarar skulu verða tilgjørdir fyri at lúka ásetingarnar. Legg til merkis, at pláss skal verða millumvegg og vangarnar (15 cm) til handfesti.
Sama áseting er galdandi fyri leytarar, sum fyri stigar, at teir skulu røkka 1,0 m upp um atkomustaðið.

## *Lavettstigar.*




- Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at neyðuga undirlagið er forsvarligt, har stigin verður settur upp.
- Undir arbeiði við lavettstigum skal tað altíð verða ein vaktarmaður.

- Verður stigin nýttur á ferðsluøkjum, skal neyðug ferðsluavvísing verða ella økið skal verða sperrað.
- Tað er bannað at flyta stigar við persóni í.
- Tað er bannað at heysa ella lora tungar og óhandigar lutir frá mannaðum stiga.
- Tað skal finnast ein skrivlig leiðbeining til stigan á føroyskum máli (danskt, norskt og svenskt mál kann góðtakast).
- Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at lavettstigar bert verða nýttir av persónum, ið hava fingið neyðuga leiðbeining og upplæring í nýtslu og dagligum viðlíkahaldi av lavettstigum.

### *Viðlíkahald, royndir og umvæling.*

- Lavettstigar skulu eftir tørvi, tó í minsta lagi eina ferð um árið roynast av sakkønum persóni.
- Umvælingar mugu bert gerast av sakkønum persóni.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 12. oktober 1995.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)